Ár 2023, sunnudagin tann 11. juni, kl. 13.00, varð ársaðalfundur hildin hjá Hondbóltssambandi Føroya (HSF) í skúlanum í Vestmanna.

Til staðar á fundinum vóru umboð fyri 9 ymisk hondbóltsfeløg umframt umboð fyri Starvsnevnd HSF´s, Mark Lausen-Marcher, Ári Roach, Hallur Danielsen og Hans Jón Thomsen frá umsitingini hjá HSF, og Jens Andrias Vinther, advokatur.

Fundarskráin var sambært § 4, stk. 2 í viðtøkum felagsins:

1. Val av orðstýrara
2. Formaðurin greiðir frá virki sambandsins í farna ári
3. Kassameistarin leggur fram grannskoðaðan roknskap
4. Kunning um fíggjarstøðuna inniverandi ár
5. Góðkenning av yvirskipaðari virksemis- og rakstraræ tlan í komandi ári
6. Innkomin mál
7. Val av nevndarlimum og eykalimum
8. Val av grannskoðara
9. Áseting av limagjaldi
10. Ymiskt

Ad. 1 – Val av orðstýrara

Stjóri HSF´s, Hans Jón Thomsen, skeyt upp at velja Jens Andrias Vinther, advokat, sum fundarstjóra. Av tí at onki annað uppskot var, varð Jens Andrias Vinther valdur sum fundarstjóri uttan atkvøðugreiðslu.

Fundarstjórin takkaði fyri álitið og staðfesti, at fundurin var lógliga innkallaður og harafturat viðtøkuførur.

Ad. 2 – Formaðurin greiðir frá virki sambandsins frá farna ári

Fundarstjórin gav síðani Gunn Ellefsen, starvsnevndarforkvinnu, orðið til at greiða frá virki sambandsins í farna ári.

Gunn Ellefsen, starvsnevndarforkvinna, gav aðalfundinum ein samandrátt av frágreiðing starvsnevndarinnar frá seinasta ári, sum áður varð send limafeløgunum við teldubrævi. Frágreiðing starvsnevndarinnar varð góðkend uttan atkvøðugreiðslu.

Ad. 3 – Kassameistarin leggur fram grannskoðaðan roknskap

Jógvan Emil Nielsen, næstformaður, legði síðani fram roknskap felagsins. Roknskapurin vísti eitt hall á kr. 1.301.000 í mun til eitt hall á kr. 996.875 fyri undanfarna ár, 2021. Fíggjarstøðan javnvigaði við kr. 1.289.000 í mun til kr. 1.665.466 fyri seinasta roknskaparár.

Somuleiðis vísti roknskapurin, at eginognin nú var negativ við kr. 1.811.000 í mun til at vera negativ við kr. 509.000 fyri 2021.

Einstakir spurningar vóru til roknskapin, herundir um leikaraflytingarútreiðslur og um negativa eginpeningin. Hereftir bleiv ársroknskapurin góðkendur uttan atkvøðugreiðslu.

Ad. 4 – Kunning um fíggjarstøðuna í inniverandi ári

Jógvan Emil Nielsen kunnaði um fíggjarligu gongdina hjá HSF og annars um fíggjarstøðuna í inniverandi ári, og kunnaði í hesum sambandi um, at gávan á kr. 2.500.000, sum HSF hevði fingið frá Betri Stuðulsgrunninum, fór at viðføra, at eginogn felagsins fór at koma upp aftur á pluss. Hann kunnaði tó samstundis um, at verandi gongd, har úrslitini hjá ymsu hondbóltslandsliðunum alsamt eru betri enn fíggjarstøðan hjá HSF loyvir, allarhelst fer at viðføra, at eginognin hjá HSF eftir stutta tíð aftur gerst negativ.

Ad. 5 – Góðkenning av yvirskipaðari virksemis- og rakstraræltlan fyri komandi ári

Nevndin kunnaði um, at hetta punktið varð liðugt viðgjørt undir punkti 4 omanfyri.

Ongir spurningar vóru til virksemis- og rakstrarætlanina, og hon varð tí góðkend uttan atkvøðugreiðslu.

Ad. 6 – Innkomin mál

Onki mál var innkomið til aðalfundin, og farið varð tí til næsta punkt á skránni.

Ad. 7 – Val av nevndarlimum og eykalimum

Fyri vali sum nevndarlimir stóðu

Jógvan Emil Nielsen – tók við afturvali
Birgir Kass – tók við afturvali
Heini Ellingsgaard – tók við afturvali

Frammanundan aðalfundinum hevði STÍF skotið Kristian Østergaard upp sum starvsnevndarlim hjá HSF, og av tí, at tað sostatt vóru 4 uppskot til tríggjar nevndarsessir, boðaði Birgir Kass frá, at hann veik sítt pláss fyri Kristiani Østergaard, og Jógvan Emil Nielsen, Heini Ellingsgaard og Kristian Østergaard vórðu tí valdir í starvsnevnd HSF's uttan atkvøðugreiðslu og við lógvabrestum.

Fyri vali sum varalimir stóðu

Djóni Højgaard – tók ikki við afturvali
Høgni Vilhelmsen – tók við afturvali

Av tí, at Birgir Kass boðaði frá, at hann var sinnaður at taka við sum varalimur, og hann sostatt saman við Høgni Vilhelmsen var einasta uppskoti til varalim, vóru Høgni Vilhelmsen og Birgir Kass valdir sum varalimir í starvsnevnds HSF's uttan atkvøðugreiðslu og við lógvabrestum.

Ad. 8 – Val av grannskoðara

Starvsnevndin skeyt upp at velja grannskoðaravirkið Januar aftur sum grannskoðara, og av tí at onki mótvalevni var, varð P/F Januar afturvalt uttan atkvøðugreiðslu.

Ad. 9 – Áseting av limagjaldi

Aðalfundurin samtykti einmælt at varðveita limagjaldið óbroytt.

LEKS
ADVOKATFIRMA

Ad. 10 – Ymiskt

Gunn Ellefsen, starvsnevndarforkvinna, greiddi frá teimum avbjóðingunum, sum føroyskur hondbóltur stóð yvir fyri í sambandi við styrkivenjing, og aðalfundurin hevði tí eitt kjak um styrkivenjing, og teir trupulleikar, ið manglandi styrkivenjarar kundu viðføra hjá avísum feløgum.

Eftir hetta vóru ikki fleiri punkt á skránni, og fundarstjórin takkaði tískil fyri góðan fundarsið, og niðurlegði fundin kl. 14.30.

Fundur lokin.

Jens Andrias Vinther, fundarstjóri